VIÐMERKINGAR

# Guds persónliga tsunami

**Jenis av Rana**



Hon rakar óvæntað og meint, á køldum føroyskum vegum og á sólgyltum, pálmaklæddum strondum í Fjareystri- køvandi sorgin. So meinings- og miskunnarleyst verða tey rivin burtur, høg sum lág, rík og fátøk, ung og aldrandi.

Hvar er Gud í øllum hesum, hoyrdist ein spyrja nú um dagarnar.

Dagur var, tá eisini Hann misti, enntá sítt einasta og besta, einkarsonin. Um nakrantíð, so hevði Harri og Skapari Himins og jarðar tá bæði motiv og mátt at steðga oyðanini og deyðanum, men Hann gjørdi tað ikki. Gav hann eftir fyri freistingini, var við eitt øll vón úti fyri okkum menniskjum, og sorgarleikir, sum hesar dagar so miskunnarleyst raka, høvdu verið fyri lítið at rokna.

Gjølla varð størsta bjargingarætlan, søgan veit um at siga, løgd til rættis. Uppgávan var greið, øll mannaættin var í vága, einasta bjarging var at Faðirin sendi einkarsonin til jarðar. Men støðan var enn daprari, tí tey neyðstaddu fóru, og tað vistu Faðirin og sonurin fullvæl, at havna bjargingarroyndini, fóru at forfylgja og at enda gera av við Frelsaran. Men hetta var einasta loysnin.

Tað er fullgjørt, ljóðaði boðskapurin av Golgata, dagin tá bjargingargrundarlagið var fullført. Eingin mannaætlan, eingin ágangur manna, hevði megna at forða stórstu bjarging søgan veit frá at siga.

Síðani henda dagin er eingin sleptur upp á fjall, hvussu stór sorgin og vanlukkan enn hava verið. Við friði og gleði hevur kærleiksfulli hjálparin verið á vitjan, í smáttu og borg, hjá ríkum og fátækum, høgum og lágum.

Her hjá okkum, eins og í fjareystri, vitjar Hann við sínum av naglum merktu hondum, troystar og lekir, endurreisur og veitir vón. Aftur og aftur berast søgur um hetta, her heiman og úr fjarskotnum londum.

Hvat kann tsunami vanlukkan læra okkum?

Hon kann knýta okkum tættari at Honum, sum heldur á at veita hjálp sína, tá sjálvt frægastu hjálparfelagsskapir noyðast at gevast. Og hon kann leiða okkum til Hansara, sum í hjálp sínari ynskir at brúka teg og meg og tey evni, teir møguleikar og tað tilfongi, sum Hann hvønn dag lutar við tey, sum standa honum tøk.

Tær krónur, privatar ella almennar, sum okkum unnist at geva, eru allar givnar okkum av Honum. Hvønn dag tráar Hann eftir at stýra viðurskiftum okra, so vit kunnu gerast før fyri at verða partur av tí lívgevandi virksemi, sum Hann ynskir at veita Skapanarverki sínum - her í ríkum norðuratlantsoyggjum ella í fjarastu av tsunami raktu.

Eingin missir við at geva eftir leiðslu og hjartalagi Hansara. Ríkari, og á allan hátt signaður, verður hin einstaki og tann tjóð, sum letur upp hond sína fyri tí treingjandi, og tað kundi verið tú ella eg - sum taldust millum hesi.

Lat okkum í felag leggja lunnar undir enn størri hjálpararbeiði!

Tá tsunami og okkara óskiljandi heimligu sorgarleikir, eru komnir í fjarstøðu, heldur neyðin tó á hjá summum. So var eisini áðrenn seinna jóladag, dagin tá kreftur jarðarinnar bardust. "Vit her í Kongo hava 11. septembur hvønn dag"- ljóðaði herfyri frá hjálparmanni. Hann stríddist eitt fyri hann vónleyst stríð móti valdsgerðum, sum menniskju miskunnarleyst framdu móti sjálvt verjuleysum kvinnum og børnum í av menniskjum gloymdum økjum. Í túsundatali doyðu og doyggja hvønn dag, uttan at vit frætta stórvegis, menniskju skapt í somu mynd sum tú og eg.

Lat takksemi og hjálpsemi fylla okum, okum sum fingu forrættin at verða fødd í landi, sum av røttum kann kallast forgarður paradís. Lat okum í felag, meðan tsunami og heimligu sárini lekjast, leggja lunnar undir eitt enn størri og dagligt hjálpararbeiði, sum fer at náa tey, sum valla megna at rópa neyðarrópið, so tað hoyrist. Gera vit tað, hevur tsunami, hóast sorgarleikur av teim stórstu, megna eisini at borið gott við sær. Megna at veitt hjálp til teirra, sum hava mist vónina- í Sudan, Kongo, Indonesia, Norðurkorea, í flóttafólkalegum heimin runt- listin er langur og longri.

Men hjálp tín og mín, borin víðari frá Honum, sum skapti ein útveg, kann stytta hann!

Opið bræv til ábyrgdarpersónar á Sjónvarpi Føroya

# Takk fyri barnasendingina!!!???

**Gunnar K Nattestad**



Týskvøldið 4. januar kl. 19, sendi SVF ein dokumentarfilm um eitt lespiskt par. Serliga senditíðin og boðskapurin í hesi sending vóru óheppin og skeiv.

Fyri tað fyrsta er senditíðin fullkomuliga undir allan kritik, líkamikið hvat vit annars meina um evni. At senda eina sending, ið er "spennandi" í kraft av sínum sexuella boðskapi/undirtóna, beint eftir ein barnateknifilm, er so vánaligt, at eg haldi SVF (ella hvat tað nú eitur) átti at komi við eini umbering.

Fyri tað næsta gekk boðskapurin í sendingini, beint móti kristnu siðalæruni, við at vísa homosexualitetur sum verandi rættur, góður og enntá at fáa Guðs signing. Eingin ivast í hvat Jesus og harvið kristna siðalæran, sigur. Homosexualitetur er synd og er tí ein samlívs háttur, ið er undir Guðs banning eins og øll onnur synd. Hevði tí hugsa mær at føroyskt sjónvarp, við m.a. atlitið til okkara kristna mentunararv, tók hædd fyri hesum.

Tað vísur seg eisini sum SVF metur virðisløntar sendingar vera eina rættvísgerð í sjálvum sær fyri at senda tær í Føroyum. Ein og hvør ið fylgir eitt sindur við veit, at nógvar virðisiønir er at fáa runt um í heimunum og grundarlagi fyri at fáa eina virðisløn er sera ymiskt. Eitt nú fáa pornofilmar eisini virðisiønir, men tað er vónandi ikki nokk til at vit fáa teir at síggja í SVF.

Eg vóni at avvarandi ábyrgdarpersónar vilja svara hesum brævið alment, so at vit vita hvat vit kunna vænta okkum sum sjónvarpshyggjarar í framtíðini.

Annars skal SVF hava rós fyri at gera eitt gott arbeiði við fleiri føroyskum sendingum, m.a. gerð og týðing av barnasendingunum v.m.

Avrit sent sjónvarps stjóranum, mentunarleiðaranum og avvarðandi landsstýrismanni.

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Um ummæli

**John Berg í Nesi**
*Hvalba*

Lesi vanliga við stórum áhuga øll ummæli av bókum og fløgum í føroysku bløðunum.

Slapp tíverri ikki ígjøgnum nú fyri nøkrum døgum síðani Fimmarin í Ùtvarpinum viðgjørdi hetta evnið.

Ymist er, hvussu tey, ið ummæla føra pennin.

Eitt er tó vist, var eg ein av hesum, ið hava "patent" uppá, hvussu ein bók ella fløga "eiga" at vera, hevði eg lagt meg í seðlarnar, tí helst hevði óført av peningi verið at forvunnið !!!!!

# Dópur og navnagáva

TÍÐINDASKRIV
*frá Fróðskaparsetri Føroya*

**Ritgerðarkapping á Fróðskaparsetrinum 2004-05. Freistin at lata inn er 15. februar**

Í september mánaða lýsti Fróðskaparsetrið við nýggjari ritgerðarkapping við evninum "Dópur og navnagáva." Hetta er 28. ritgerðakappingin, sum Fróðskaparsetrið hevur skipað fyri síðani 1970.

Sóknast verður eftir lýsingum av siðum í sambandi við, at børn verða doypt ella navngivin. Siðir bæði í eldri tíð og okkara tíð hava áhuga. Hvussu nógv tann skrivandi viðger øðrumegin eldri og hinumegin nýggjari siðir, ger tann skrivandi sjálv/ur av. Nýggir siðir og gamlir siðir hava eins stóran áhuga. Millum møguligar spurningar at viðgera kunnu nevnast: Hvussu verður atborið, tá ið navn verður valt barninum? Uppkallingarsiðir ella ikki? Hvussu gamalt er barnið, tá ið tað fær navn ella verður doypt? Er navnið loyniligt fram til ta avgerandi løtuna? Hvussu er hátíðarhaldið ella hendingin sjálv? Hvørjir persónar eru týdningarmiklir í hesum sambandi? Hvussu stórur partur av familjuni er við í hesum? Hvussu eru siðirnir í sambandi við (døgurða)veitslu eftir, at barnið er navngivið ella doypt? Aðrir siðir í hesum sambandi?

Tað eru sum so ikki nøkur formlig krøv til ritgerðina, men væntað verður, at fólk greiða frá slíkum, sum tey annaðhvørt sjálvi hava verið við til ella hoyrt onnur, td. foreldur, ommur og abbar greitt frá. Ritgerðirnar vera ikki dømdar eftir skaldsligu dygdunum, men eftir sjálvum innihaldinum, tvs. hvørjum og hvussu tað verður greitt frá teimum ymsu siðunum í sambandi við dóp og navnagávu.

Freistin at lata inn tilfar til kappingina er 15. februar 2005. Fólk eru vælkomin at seta seg í samband við Fróðskaparsetrið, um okkurt er at spyrja um, annaðhvørt skrivliga ella við at ringja. Bústaðurin er: Setursskrivstovan, J. C. Svabos gøta 14, tlf. 35 25 00. Eisini ber til at senda teldubræv á setur@setur.fo

Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomna tilfarið, og virðisiønir verða latnar fyri bestu úrslitini.

Fróðskaparsetrið hevur tey seinastu fleiri enn 30 árini skipað fyri ritgerðakappingum. Seinasta kappingin var um "Skiftissiðir í sambandi við gentur og dreingir gerast vaksin". Inn komu 3 handrit, og fingu høvundarnir bókagávu frá Fróðskaparsetrinum sum takk fyri luttøkuna.